

*Schandorff hevur skotið seinasta pílin, og tað er greitt, at Føroyar hava vunnið gullmerkið í head-to-head kappingini fyri lið*

# So kom gullið

**Bogaskjúttarnir tóku av seinasta møguleikanum fyri gullmerkjunum, tá compound-liðið hósdagin vann liðkappingina í head-to-head**

BOGASKJÓTING
*Jákup*

**Guernsey:** So kom tað. Gullið, sum bogaskjúttarnir mest sum hava havt patent upp á í oyggjaleikahøpi, hevur bíðað leingi hesaferð. Eitt silvur- og trý bronsumerki var úrtøkan teir báðar fyrstu kappingardagarnar, og tað var helst minni enn tað, sum málið var undan leikunum.

### Tætt hjá recurve'num

Seinasti møguleikin fyri gullinum var hósdagin, tá liðkappingin í nýggju head-to-head kappingini stóð á skránni. Her er talan um tríggjar skjúttar, sum innan tveir minuttir skulu skjóta tríggjar ørvar hvør. Hetta verður endurtikið tríggjar ferðir, soleiðis talan íalt er um 27 ørvar, sum verða sendir avstað. Sama er galdandi fyri mótstøðuliðið, og so er bara at telja saman fyri at vita, hvør sleppur at halda fram í kappingini, og hvør noyðist út.

Grundað á silvurmerkið í liðkappingini í FITA umfarinum sluppu compoundskjúttarnir undan at dystast í fjórðingsfinaluni. Her skuldi Recurve-liðið dystast við Guernsey, og tíverri fyri føroyska liðið, so endaði hetta við sigri til heimaliðið.

Talan var tó ikki um nakran stóran mun. Fyrsta umfarið misti føroyska liðið ov nógv, og tó at roynt varð at toga hetta aftur, so vóru tey av Guernsey ov stinn í síni skjóting. Enn ikki eitt sera gott seinasta umfar hjá Kristiani Niclasen kundi broyta hetta. At Kristian kom inn at skjóta, var sum so ikki partur av uppranaligur ætlanini. Tað er nevnliga so, at umframt tey trý, sum skjóta fyri liðið, kunnu eykaskjúttar eisini vera tøkir, soleiðis at hesir kunnu traðka inn, um tað onkursvegna gerst neyðugt. Tað mettu føroyingarnir, at tað var, tá Rói Johannesen ikki tóktist hava sín besta dag, og Kristian gjørdi ikki mætari enn at knalla tveir av trimum ørvum í gult, men hetta var so ikki nóg mikið hjá liðnum. Hini bæði á liðnum vóru annars Annika Vang, sum helst dró størstu byrðuna í dystinum og so Rógvi Mohr.



*Hjá áskoðarunum var spenningurin stórur, tá tey skiftivís settu kikaran móti føroysku talvuni og teirri hjá Guernsey*

### Gull-liðið

Tá farið varð undir hálvfinalurnar, var tíð hjá compound-liðnum hjá okkum at traðka inn í kappingina. Á liðnum her vóru Schandorff Vang, Sigrid K. Vang og Jóannes Poulsen, meðan Anders Jønsson og Alberta Gaardlykke stóðu til reiðar at koma inn, um okkurt skuldi verið áfatt.

Í hálvfinaluni skuldu føroyar takast við Isle og Man, sum í FITA-umfarinum endaði á triðja plássinum. Hendan dystin vunnu okkara, og so var klárt til finaluna. Hendan kom at standa millum Føroyar og Guernsey, sum í sínari hálvfinalu vann á Jersey.

Føroyska liðið legði væl frá landi, og fekk longu eftir fyrstu níggju ørvarnar eitt lop á tíggju stig niður til hini, tá umfarið endaði 70-60. Næsta umfarið endaði 67-69, soleiðis at munurin minkaði niður í átta stig, og hóast hetta er ein tolulig leiðsla til níggju ørvar, so var alt framvegis púrasta opið. Ikki minst tí nervarnir so ofta kunnu spæla skjúttunum eitt puss í hesum kappingarslagnum.



*Recurve skjúttarnir vóru heilt nær við at taka Guernsey aftur, men tey gjørdust tvey stig ov stutt, og sluppu tí ikki í hálvfinaluna*

Men føroyingarnir hildu høvdið kalt. Sigrid, sum kanska ikki skeyt so væl fyrstu umførini, brendi alt fyri eitt nakrar ørvar í gult, meðan spentu liðfelagarnir kundu síggja, at tað ikki gekst heilt so væl hjá Guernsey. Jóannes stóð púra stúttur í sínum skotum, hóast pulsurin helst mundi vera omanfyri tey 200, og fagnaðarrópini mundu valla fingið nakran enda, tá tað samstundis sást, at ørvarnir hjá Guernsey nú flákraðu kring allan sólarringin.

Schandorff var seinasti føroyski skjúttin, og heldur ikki her var nakar ivi. Hesar seinastu tveir minuttirnar vunnu Føroyar ikki minni enn 78-64, og við samanløgdu 215-193 var eingin sum helst ivi um, hvør hevði bestu skjúttarnar. Tað høvdu Føroyar, og so var loksins eitt gull komið í bogaskjúttaraleguna.



# Nervar av stáli



*Sigurin er heima, og so er tíðin komin til ein koss av tí heilt gylta slagnum*

**Eftir sjeynda plássið í FITA-umfarinum sýndi Jóannes Poulsen, at hann veruliga er ein av teimum, sum roknast kann við, tá mest stendur á**

SAMRØÐA
*Jákup*

Hjá Jóannes Poulsen mundi sigursløtan hósdagin kennast sum nakað heilt serligt. Í mun til meira royndu liðfelagar sínar hevði hann ongan tíð vunnið gull á oyggjaleikum áður, og tað var sjónligt, at hetta var ein heilt serlig løta, sum líka skuldi hava tíð at sodna eitt sindur.

\- Hetta er ótrúliga gott. Eg vann silvur við liðnum í FITA-umfarinum, men tá taldi mín skora ikki við, tí eg hevði eitt so vánaligt fyrsta umfar. Hetta er í so máta mítt come-back. Her fekk eg lyft meg sjálvan uppaftur, og tað er ein fantastisk kensla, nú vit hava vunnið.

Við á leið 20 sekundum til hvønn ørvin, skuldi ein hildið, at tað mundi vera frægast við fullkomnari tøgn uttan um seg. Men hetta bar bara ikki til hósdagin. Umframt føroysku liðfelagarnar stóðu eisini hópur av teimum, sum hava skotið seinastu fýra dagarnar, og heppaðu føroyska liðið. Spurdur, um hetta ikki var nakað, sum órógvaði konsentratióna undir skotunum, hevði Jóannes hug at draga á bæði borðini.

\- Tað er kanska nakað, sum órógvar eitt sindur, men tað kennist væl. Tá følir tú, at hevur uppbakning fyri tí, sum tú gert, og tað er ein ótrúliga góð kensla, sum tú annars ikki ert vanur at hava, tá tú skjýtur, segði ein fegin vinnari at enda.

Eykamaðurin:

# Ræðuligt



*Eg var sjálvandi til reiðar at koma inn, men sjálvur vónaði eg so, at tað ikki fór at gerast neyðugt*

**Hóast Anders Jønsson skuldi vera til reiðar at koma inn á føroyska liðið, so gekk hann við eini stillari vón um, at hetta ikki skuldi gerast neyðugt**

SAMRØÐA
*Jákup*

Meðan liðfelagarnir skutu seg til gullið hósdagin, gekk Anders Jønsson óróligur á skjótiøkinum. Nervarnri tóktust mest sum at hanga uttan á klæðum hansara, og eftir sigurin viðgekk hann eisini, at so var.

\- Hatta var ræðuligt. Eg var sjálvandi til reiðar at koma inn, men sjálvur vónaði eg so, at tað ikki fór at gerast neyðugt. Trýstið í eini slíkari kapping er stórt, tí tú hevur jú einki at geva av, og kiksar tú ein píl, so er tað kanska nóg mikið til, at liðið tapir dystin.

\- Nú er tað tó liðugt. Vit hava vunnið eitt gullmerki, og tað er bara heilt fantastiskt, segði Anders at enda.

# Tóku okkum saman

**Hóast trupla byrjan, so kom Sigrid K. Vang sterkt aftur, og við framúr skjóting í seinasta umfarinum legði hon lunnar undir føroyska sigurin, sum sostatt ongan tíð kom í vanda**

SAMRØÐA
*Jákup*

Ein av teimum heilt royndu í føroyskari bogaskjótin er uttan iva Sigrid K. Vang, sum higartil hevur tikið fleiri gullmerki heim við til savnið heima hjá húskinum.

Hesa ferð var tó um reppið, at einki gylt metal kom til høldar, og Sigrid var sjálvandi ovurfegin, nú tað kortini eydnaðist í seinastu royndini.

\- Vit vistu av, at hetta var seinasta útkall, um tað skuldi verða til nakað. Hvør í sínum lagi royndu vit so at taka okkum saman, soleiðis at vit fingu lyft okkum sum lið.

\- Tað tóktist eisini at eydnast væl í morgun, men sum dagurin leið, so kom alt meira vindur, og tí høvdu vit helst nakað væl av nervum, áðrenn vit fóru undir finaluna.

Sjálv fekk Sigrid heldur ikki best hugsandi byrjanina til hetta umfarið, men hon megnaði kortini at reisa seg, og seinasta umfarið tóktist als eingin ivi at vera. Tað má sigast at vera væl afturkomið av skjúttanum, tá talan bert um níggju ørvar, og sjálv tóktist Sigrid eisini at vera fegin um, at hetta hevði eydnast henni.

\- Tað er jú so lítið at geva í slíkari kapping, og tí gongur tú nærum og hugsar um, at tú kanska hevur kostað sigurin, um okkurt kiksar. Tá mást tú bara royna at reisa teg aftur, og tíbetur eydnaðist tað, segði altso Sigrid K. Vang at enda.




*- Vit vistu av, at hetta var seinasta útkall, um tað skuldi verða til nakað, helt Sigrid eftir finalusigurin*